# Fiskivinnuráðstevna á Hotel Hafna

**Umboð fyri fiskivinnu og vísindi møtast á mini ráðstevnu við Menakhem Ben-Yami**

FISKIVINNA

Føroya Fiskimannafelag, Meginfelag Útróðrarmanna og Føroya Reiðarafelag skipa fyri mini ráðstevnu á Hotel Hafnia fríggjadagin tann 7. juli í sambandi við at heimskendi fiskivinnuráðgevin Menakhem Ben-Yami vitjar í Føroyum.

Tann skjótt 80 ára gamli men óvanliga birgi Menakhem Ben-Yami, sum fyrr hevur vitjað í Føroyum, er gestur hjá teimum trimum feløgunum. Hann og kona hansara, Hanna, komu um vikuskiftið úr Íslandi aftan á vitjan í USA og tey fara heim aftur til Ísrael leygardagin tann 9. juli.

Ben-Yami hevur í nógv ár arbeitt á altjóða stigi við ráðgeving innan menning og stýring av fiskivinnu og hevur starvast fyri ST matvørustovnin FAO í ymiskum londum. Hann hevur skrivað hópin av vísindaligum ritgerðum um fiskitøkni og vistfrøði umfram hugleiðandi greinar um fiskivinnu viðurskifti, ikki minst í blaðnum World Fishing. Í 2004 gjørdist hann av álvara kendur í Føroyum í samband við fiskivinnuráðstevnu hjá Farec.



*Miniráðstevnan á Hafnia fríggjadagin varir frá kl 15 til 18 og er opin fyri almenninginum. Høvuðsevnið snýr seg um hvussu betri samstarv kann fáast millum fiskivinnu og vísindi og um fiskidagaskipanina so væl sum aðrar aktuellar spurningar við atliti til ta føroysku fiskivinnuna. Umfram Ben-Yami fara umboð fyri vinnuna og Fiskirannsóknarstovuna at leggja fram sjónarmið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Undir vitjan síni í Føroyum hittir Ben-Yami m.a. umboð fyri Fiskimálaráðið, Fiskirannsóknarstovuna, Fiskidaganevndina umfram fiskimenn, reiðarar og onnur.

Miniráðstevnan á Hafnia fríggjadagin varir frá kl 15 til 18 og er opin fyri almenninginum. Høvuðsevnið snýr seg um hvussu betri samstarv kann fáast millum fiskivinnu og vísindi og um fiskidagaskipanina so væl sum aðrar aktuellar spurningar við atliti til ta føroysku fiskivinnuna. Umfram Ben-Yami fara umboð fyri vinnuna og Fiskirannsóknarstovuna at leggja fram sjónarmið. Høvi verður eisini at seta spurningar og gera viðmerkingar. Mini ráðstevnan fer fram á enskum máli.

# Gera býaratlans fyri Havnina

**Skráseting og útgáva av uppriti um býarpartar, hús, gøtur, náttúruøki og fornminnir í Tórshavnar kommunu**

KUNNING UM HAVNINA

*Tíðindaskriv*

Tórshavnar kommuna arbeiðir í løtuni við at gera eitt býaratlas, sum inniheldur skráseting av bygningum, sum eru bygdir fyri 1958, og sum kortleggur náttúru- og mentunarumhvørvið í býnum. Nýggj umhvørvi verða eisini skrásett, um tað verður mett, at hesi hava týdning fyri heildina.

Ætlanin er at skráseta og meta um, í hvønn mun hús, vegir og økir eru áhugaverd og verd at varðveita soleiðis, at hetta ikki er í andsøgn við framtíðar býarskipan og menning. Arbeiðið er samstundis eitt lið í ætlanini hjá umsitingini í Tórshavnar kommunu um at útvega eitt yvirlit yvir sermerkt og varðveitingarverd økir og bygningar.

Arbeitt verður eftir leisti við einum altjóða royndum framferðarhátti, kallaður "SAVE", sum eisini hevur verið brúktur at gera "Kommuneatlas" í øðrum londum.

Komandi tveir mánaðirnar fara tvey fólk frá kommununi at ganga runt í býnum og skráseta bygningar. Býaratlassið verður væntandi liðugt á vári 2007.



*Birita Wardum, Inga Katrin Winther og Jógvan Arge, varaborgarstjóri*

Stjórin í Faroe Jet:

# Møtið í góðari tíð í Kastrup

**- Tað er umráðandi at møta í góðari tíð á flogvøllinum í Keypmannahavn**

FLOGFERÐSLA

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Ferðandi, sum ferðast út frá flogvøllinum í Keypmannahavn, mugu brynja seg við toli og góðari tíð, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri í FaroeJet. Tey mæla fólki til at møta á flogvøllinum í Kastrup í minsta lagi tveir tímar áðrenn fráferð.

- Hóast vit sum flogfelag onga ávirkan hava á støðuna í Keypmannahavn, verða okkara kundar raktir av trupulleikunum. Vit hava upplivað, at ferðafólk standa eftir í Keypmannahavn, tá flogfarið fer á veingirnar, tí trygdareftirlitið tekur so langa tíð. Tí kunnu vit bert mæla ferðafólki at møta í sera góðari tíð, um tey skulu ferðast út frá Keypmannahavn, sigur Jóhan E. Simonsen, stjóri í FaroeJet.

Orsøkirnar til, at tað kann verða sera drúgt at ferðast umvegis Keypmannahavnar Flogvøll, er, at sera langar bíðiraðir eru við trygdareftirlitið. Harumframt hava tekniskir trupulleikar verið við tólunum, ið flyta viðføri til og úr flogførum.

Tí er umráðandi, at ferðafólk møta í sera góðari tíð, um tey skulu ferðast úr Keypmannahavn til Føroya ella onnur lond.

Keypmannahavnar Flogvøllur kunnar støðugt um støðuna á heimasíðu sínari, www.cph.dk.


